# til New York



*Yngri Louis saman við systkinabørnun í Føroyum. F.v. Katrin Thomsen, Maj Jacobsen, Birgit Christiansen, Louis Christiansen og Sámal Christiansen*



*Louis saman við konu og dóttir*

John flutti til Australia. Men kortini verður roynt at hava samband í ættini. Tey hava havt familjusamkomur, og ein hevur júst verið í Danmark, har tað vóru 27 fólk til staðar. Hetta var ættin hjá Hans Leon, beiggja Louis hjá Sámal, saman við umboðum frá ættini í Føroyum og USA.

## Hógligur republikanari

Louis hevur einki ímóti at tosa um politikk. Hann sigur seg at vera hógligan republikanara. Politiska áskoðanin spennir ofta sera vítt í USA, men tað er meira aðra staðni í USA. Í New York er fólk meira hóglig, uttan mun til hvønn flokk tey velja.

Louis hevur tvær ferðir atkvøtt fyri George W Bush sum forseta, men hann er sera vónbrotin av Bush. Her er tað serliga Irak kríggið sum telur hjá honum eins og hjá so nógvum øðrum amerikanarum. Trupulleikin við Bush er tann, at hann hevur valt sær skeivar ráðgevarar, sum er tann gamla konservativa gardan hjá pápa hansara George Bush, e. Bush skuldi heldur lurtað eftir monnum sum Colin Powell, sum var uttanríkisráðharri fyrra forsetaskeiðið hjá honum. Powell lurtaði Bush ikki eftir, og tískil legði Powel frá sær meira ella minni vónbrotin.

Tað er greitt, at tað er gingið heilt galið í Irak. Amerikanarar hildu tað vera sloppið, tá ið tann stóra standmyndin av Saddam Hussein var koppað í Bagdad í 2003, men tástaðni byrjaði størsta upptakið. Nú kom alment fram, hvussu Irak var samansett av fólki, sum hataði hvørt annað, og sum fekk fragd í at spreimgja hvønn annan í luftina. Hesum varð Bush eisini ávaraður um, men hann lætst ikki um vón.

Tað, sum krevst í einum og hvørjum landi, er stabilitetur, og er hann fyrst komin, kemur restin av sær sjálvum.

Sum dømi um hetta nevnir Louis støðuna hjá teimum svørtu í USA so seint sum í 60-unum. Her var javnan ófriður og uppreistur, tí nekarar mettu seg at vera fyri vanbýti. Men síðan hevur av øllum stjórnum verið rikin ein politikkur, har endamálið er javnrættindi, kunning og upplýsing. Hetta førir við sær meira tollyndi og harvið frið og framgongd.

Eitt annað dømi, sum Louis nevnir, er, at tað verða mett, at tað eru 12 milliónir ólógligir innflytarar í USA, teir flestu úr Mið- og Suðuramerika. Men verður víst teimum virðing, ganga bert eitt ella tvey ættarlið, til hesir eru amerikanskir borgarar sum allir hinir, og kunnu liva saman í friði og náðum.

Tað er nakað líknandi, sum má vera mátin at fáa teir víðgongdu muslimarnar at vilja liva saman við restina av heiminum í friði. Ella rættari sagt: Hetta má gerast fyri at forða fleiri muslimum at gerast víðgongdir.

## Spennandi forsetaval í USA

Nú fer at nærkast forsetavalinum í USA, sum verður í november komandi ár. Hetta førir sjálvandi prátið yvir á hetta evnið. Sambært Louis er alt sera óvist hjá báðum flokkum, sum skiftivís eiga forsetan.



*Her er ættin hjá Sámali úr Føroyum, Danmark, Australia , Englandi og USA savnað í Danmark seinast í juli. Uttast til vinstru síggja vit Sámal og Ann Christiansen. Tey komu úr Føroyum. Gamla konan í fremstu røð, er 93 ára gamla Gudrun Christiansen, einkja eftir Hans Leo*

Hjá demokratiska flokkinum er Hillary Clinton ein av teimum, sum er í fremstu røð. Hennara fyrimunur er, at tey eru mong sum elska hana, men vansin er, at tey eru kanska eins mong, sum hata hana, og sum vilja gera alt fyri at forða fyri, at hon sleppur framat. Tað hevur longu í fleiri ár verið fram ein miðvís útspilling av henni av konservativum kreftum. Spurningurin er eisini, um USA er búgvið at fáa ein kvinnuligan forseta.

Hitt evni er Barrack Obama, sum er littur. Hóast vaksandi tollyndi í USA, er tað eisini ein spurningur, um hetta hann vera ein forðing. Annars verður fornavnið eisini brúkt ímóti honum. Tað minnir so nógv um Osama! Og so hevur hann eisini Hussein til millumnavn.

Síðan er tað Al Gore, fyrrverandi varaforsetin, sum eins væl kundi verið valdur til forseta í 2000. Hann hevur ikki boðað frá, at hann stillar upp, men hann hevur heldur ikki sagt, at hann ikki ger tað. Hann stendur sera sterkur í altjóða politikki við sínum veðurlagssjónarmiðum.

Hann kann lúra uppá ta røttu løtina at boða frá sínunum kandidaturi, og tá kann hann hava ein møguleika.

Viðvíkjandi republikanarunum hevur Louis hug til at halla til fyrrverandi borgmeistaran í New Yorl Rudi Giuliani. Hann var ein ótrúliga góður borgmeistari, sum fekk rættað uppá nógvar trupulleikar, sum býurin hevði at dragast við. Men – tað er fyri tað ikki givið, at hann verður ein góður forseti. Sum borgmeistari kundi hann persónliga hava innlit í alla skipanina og ávirka hana. Hendan møguleikan hevur hann ikki sum forseti, har tað eru nógv fleiri "kokkar".

Ein vansi hjá Rudi kann vera, at hann neyvan verður stuðlaður av kristna høgravonginun, sum verður mettur at vera neyðugur serliga hjá einum republikanskum forseta fyri at verða valdur. Rudi er ikki nakað serliga kristiligur. Og so allar konurnar, hann hevur havt, sum heldur ikki fellur í góða jørð hjá mongum á tí vonginum. Men sum Louis sigur: Ronald Reagan hevði eisini verið giftur fleiri ferðir. Men alt hetta fer tíðin at vísa.

Louis og Carol høvdu nakrar góðar dagar í Føroyum, har tey vitjaðu systkinabørn og onnur ættarfólk.

Tað var sera hugnaligt at hitta tey bæði. Fyrst og fremst fyri at kunna fáa søgguna hjá enn einum føroyingi, sum fór uttanlands og eisini fyri at frætta eitt sindur um amerikanskan politikk, sum jú eisini er sera viðkomandi hjá okkum.